# til Føroya

føroysk viðurskifti, so mugu vit bíða eitt sindur longri til aftur at síggja føroyskan film á stóra skíggjanum. Hann fer nevniliga at snúgva seg um tíðina, tá Niels sjálvur gekk á studentaskúla.

- Filmurin verður tikin upp eftir trimum árum, og ein útgáva av mær verður eitt slag av høvuðspersóni, sigur Niels Malmros.

Filmurin fær væntandi heitið Kærestesorger og verður frumsýndur í seinnu helvt av 2008. Filmurin er fluttur til Viborg, hóast hann átti at gingið fyri seg í Århus, har Niels gekk á studentaskúla árini 1960 til 1963.

Hesin filmurin er eitt framhald av Kundskabens Træ, sum varð frumsýndur í 1982. Tann filmurin snýr seg um tíðina hjá Niels Malmros sum næmingur á Århus Katedralskole. Tann filmurin snýr seg í stóran mun um broytingin frá at vera barn til at gerast vaksin. Niels Malmros hevur eisini gjørt aðrar filmar, ið eru bygdir á egnar endurminningar.

Men hví skulu vit aftur nú síggja enn ein film við støði í tínum lívi?

- Eg vil so fegin siga søguna um kærleikan. Eg mangli at fortelja um kærleikan. Tað verður tað, ið hesin filmurin fer at snúgva seg um, sigur Niels Malmros.

Vit kunnu tískil vænta okkum innlit í, hvussu tað var at vera tannáringur og forelskaður í sekstiárunum. Niels Malmros lovar, at filmurin fer at líkjast hansara undanfarnu, og tað á ongan hátt verður nakar lættisoppur filmur, hann fer at frumsýna í 2008.

- Fíggingin er júst komin upp á pláss. Vit fara undir upptøkurnar í heyst, sigur Niels Malmros.

Tað eru millum annað danski staturin og Danmarks Radio, ið hava verið við til at fíggja umfatandi verkætlanina. Eftir ætlan verður samlaði kostnaðurin einar 27 milliónir krónur. Tað eru tó góðar tíggju milliónir bíligari enn Barbara.

### Fann sannleikan

Við á hesari seinastu ferðini er Jens Astrup, ið hesa løtuna situr undir hvørjum øðrum yvirav vinnimanninum. Hann er ein av teimum fáu, sum aftur og aftur eru at finna í ferðalagnum hjá Niels Malmros. Jens Alstrup hevur til fyri kortum røkt starvið, ið pápi Niels Malmros, Richard, røkti sum skurðlækni.

Tað var eisini Richard Malmros, ið gjørdist høvuðspersónur í seinasta filminum hjá Niels Malmros, At kenda sandheden. Filmurin fekk ovurhonds góð ummæli og verður róptur fyri eitt meistaraverk. Filmurin snýr seg um truplu tíðina hjá Richard Malmros sum yvirskurðlækni, ið nýtir eitt vandamikið evni til heilaskurðviðgerðir. Filmurin vísir sera væl sambandið millum faðir og son, og hvussu trupult tað er at siga eina søgu, ið stendur einum nær. Sjálvur er Niels Malmros eisini útbúgvin lækni, men hann hevur bert virkað sum avloysari, millum annað í Føroyum.

- Eg droymi um at gera eina av bókunum hjá Williami Heinesen til film, men tað verður mestur ikki til veruleika. Eg verði 64 ár, tá hesin næsti filmurin er liðugur, og tá er ivasamt, hvussu nógvar filmar, eg eigi eftir í mær, sigur Niels Malmros.

Hann roknar við, at hesin næsti filmurin verður tann síðsti, hann fer at gera.

- Men tað sigi eg eisini hvørja ferð. Men eg komi í øllum førum aftur og aftur til Føroya, sigur Niels Malmros.

Tað er kanska ikki so galið í Føroyum.



*Niels Malmros sum vit kenna hann. Millum mest umhildnu fólk í Føroyum, tá hann gjørdi sín dreym til veruleika og gjørdi Barbaru til film.*



*Fjarhiti er orkuvinarligur men ikki serliga bíligur í hesum døgum.*

# Yvirtrýst á fjarhitanum

**Fjarhitafelagið nýtir ikki olju at framleiða fjarhita. Kortini skulu brúkararnir rinda nógv meira fyri fjarhitan**

NÝTSLA
*Heri á Rógvi*
*heri@sosialurin.fo*

Ikki dýrari enn oljufýr. Men ikki bíligari heldur. Tað tykist at vera boðskapurin frá Fjarhitafelagið. Felagið, ið veitir umhvørvisvinarligan hita til hús í Hoyvík og á Sandvíkarhjalla, frá kommunalu brennistøðini.

Orkufelagið hjá Tórshavnar kommunu og SEV hevur sent sínum kundum boð um, at kostnaðurin fyri fjarhitan hækkar við 25%. Tað er ein meirkostnaður fyri 2.928 krónur fyri eitt miðal vanligt húsahald árliga, verður upplýst av skrivstovuni hjá Fjarhitafelagnum. Felagið hevur 550 húsarhald sum kundar.

- Tað er politikkurin hjá okkum, at prísurin á fjarhita skal vera á somu legu sum oljuprísurin. Tá oljuprísurin hækkar, so hækkar prísurin á fjarhita eisini. Og tað sama, tá oljuprísurin lækkar, sigur Hans Christian Dam, stjóri fyri Fjarhitafelagið. Og hendan politikk hevur nevndin fyri Fjarhitafelagið sett út í kortið. Og hann hevur verið soleiðis frá byrjan, tá ið kritikkur var um

- Prísirnir lækka eisini, tá oljuprísurin lækkar. Tað er tað eingin, ið skrivar nakað um, sigur Kristian Fríðrik Olsen, formaður fyri nevndina.

Fjarhitafelagið nýtir eitt sindur av olju til sína framleiðslu, men tað er ógvuliga lítið - og ikki í nær námind nóg mikið til at grundgeva fyri meirkostnaðinum av hesari orsøk. Hækkanin skyldast príspolitikkin hjá felagnum.

### Máta øðrvísi

Trupulleikin fyri teir 550 kundarnar, ið skulu av við í miðal 2.928 krónurnar afturat, er, at hetta verður ikki goldið yvir tólv mánaðir - men verður býtt javnt á seinastu fimm mánaðirnar av árinum. Soleiðis er gjaldsskipanin hjá Fjarhitafelagnum.

- Eg skilji øgiliga væl, at fólk halda hetta vera øgiliga irriterandi fyri fólk. Vit mugu fáa skipanina broytta, so fólk kunnu rinda fyri tað, tey hava brúkt beinanvegin, og tey ikki fáa eina rokning, sigur Kristina Fríðrik Olsen.

Kundarnir fáa tó ikki loyvi at keypa fjarhita undir framleiðslukostnaðin. Tað merkir, at lækkar oljuprísurin øgiliga nógv, so er eitt mark fyri, hvussu nógv fjarhitaprísurin minkar.

- Sjálvandi kunnu vit ikki selja fyri undir framleiðslukostnað. Tað er loft á bæði mesta- og minstaprísi, sigur Kristina Fríðrik Olsen.

### Broytist?

So er tað spurningurin um, hvørt politikkur hjá Fjarhitafelagnum fer at broytast í framtíðini.

Eingin ítøkilig ætlan er um broyta prísásetingina í løtuni.

- Tað rættasta hevði kanska verið um vit settu prísin frítt av oljuprísinum. Tað er nakað, vit hava tosað um, og tað kann vera, at vit fara at broyta príspolitikkin, sigur Kristian Fríðrik Olsen.

Varaformaðurin fyri Fjarhitafelagið, Hildur Eyðunsdóttir, býráðslimur í Havn fyri Tjóðveldisflokkin, sigur seg ikki duga at siga sum er, hvørt hon heldur, at priásetingin hjá felagnum skal broytast.